

KOMMUNALA ARBEIÐSGEVARAFELAGIÐ
FØROYA PEDAGOGFELAG

HANDAÐ NOV. 2022

# Kanning av dagstovnunum í Føroyum

## Annað arbeiði - fyrireiking og eftirmeting

# KANNINGARTOYMIÐ



Hjørdis Gaard cand.scient.pol. og PGDip. í leiðslu
Anna Sofía Veyhe Phd, MPH í fólkaheilsu og ljósmóður
Gitte Klein lærari, cand.psych., MAPP í positivari sálarfrøði

**Framløgan er um partar av kanningarúrslitunum og frágreiðingina.**

Endamálið við kanningini var at lýsa verandi skipanir hjá einstøku kommununum viðvíkjandi tíð til annað arbeiði, við serligum atliti til at fyrireika og eftirmeta námsfrøðiliga arbeiðið.

# Yvirskipaði kanningarstig

Lýst gjørdar kanningar aðrastaðni um annað arbeiði, fyrireiking og eftirmeting

Verkstovur við fokusbólkum við leiðarum og starvsfólkum at nágreina og allýsa hugtøk og lýsa og bólka uppgávur hjá starvsbólkunum

Gjørt nýggj spurnabløð

Samskipan og sparring við fylgibólkin og ávegis framløga av úrslitum fyri stýrisbólkin og fylgibólkin

Leypandi kunning til leiðarar og álitisfólk

Pilotkanning á stovni, umframt við leiðarar

Spurnablað til leiðarar
Spurnablað til námsfrøðingar og hjálparfólk

Dátuviðgerð og frágreiðing

Framløga av frágreiðingini fyri KAF og Pedagog-felagnum okt. 2022

Endalig handan av frágreiðingini í nov. 2022

# ANNAÐ ARBEIÐI

Markamótið ímillum "barnatíð" og annað arbeiði

Er tað barnatíð og/ella annað arbeiði, tá ið starvsfólk:

- eru andlit til andlits við barnið?
- gera praktiskar uppgávur saman við børnum?
- gera praktiskar uppgávur í sama rúmi sum børnini, uttan at børnini eru við?
- fyrireika námsfrøðiliga arbeiðið, meðan børnini eru til staðar?
- eftirmeta námsfrøðiliga arbeiðið, meðan børnini eru til staðar?
- eru avbrotin av telefonini og øðrum?
- hava samrøður við foreldur, tá ið barnið kemur og fer?
- hava samrøður við onnur enn børnini, t.d. onnur starvsfólk, leiðaran ella fakfólk, meðan børn eru til staðar, men uttan at børnini eru við í samrøðuni?

# AVMARKINGAR

Vøggustovur, barnagarðar og frítíðarskúlar - ikki forskúlar, dagrøkt og ungdómshús.

Bert limir í Pedagogfelagnum.

Bert starvsfólk, sum hava arbeitt á dagstovni fleiri enn 3 mánaðir og fleiri enn 15 tímar um vikuna, eru biðin um at svara spurningunum.

Eins nógvir námsfrøðingar og hjálparfólk vóru úttikin, hóast starvsfólkabýtið ikki er javnt.

# UTTANFYRI KANINGAR ØKIÐ

Sjúkufrávera

Normeringar

Rekrutteringsstøðan á dagstovnaøkinum.

Góðskustøði á tænastunum, tað vil siga lógarásett og onnur krøv, sum viðvíkja góðsku, tørvir og umstøður til t.d. menningar- og læruumhvørvið.

Fíggjarligar og fyrisitingarligar karmar um dagstovnarnar hjá landi og kommunu.

# KVANTITATIV KANNING

**Innleiðandi spurningar**

50 innleiðandi spurningar til leiðararnar.
53 innleiðandi spurningar til starvsfólkini.

**Tíðarskráseting**

Skrásett varð hvørjar 15 minuttir.

Til bar at frámerkja fleiri uppgávur í senn.

Tíðarskrásetingin fór fram í 3 sjálvvaldar dagar yvir 2 vikur.

Skrásetingartíð kl. 7 - kl. 17.

# KVANTITATIV KANNING

Kanning - leiðarar
Vika 11 og 12

100% av leiðarunum við

48 leiðarar svaraðu
Svarprosent 71%

Kanning - starvsfólk
Vika 12, 13, 17 og 18

100% av námsfrøðingunum við (501)
71% av hjálparfólkunum við (500)

322 starvsfólk svaraðu
Svarprosent námsfrøðingar 39%
Svarprosent hjálparfólk 26%

# ÚRSLIT LEIÐARAR



# PRAKTISKT ARBEIÐI - LEIÐARAR

44% av leiðarunum gera reint (t.d. vaska leikur, klæðir, vindeygu og køliskáp).

Leiðarar, sum gera reint brúka í miðal 1½ tíma um vikuna.

65% hava onga køkshjálp.

35% av leiðarunum gera høvuðsreint á dagstovninum (størri reingerðararbeiði 1-2 ferðir um árið t.d. loft, gardinur og veggir).

# PRAKTISKT ARBEIÐI - LEIÐARAR

Leiðarar brúka í miðal 6 tímar um mánaðin til handverkara/húsavarða-uppgávur t.d. heingja hillar upp, skifta ljósperur, mála veggir og umvæla vognar).

81% av leiðarunum arbeiða á stovunum.

Í danskari kanning frá 2020 sæst, at 51% av leiðarunum á donskum dagstovnum arbeiða á stovunum eftir tørvi.

# ÚTBÚGVING - LEIÐARAR




Spurningur: Í hvussu stóran mun, metir tú tað vera fíggjarligt rásarúm til, at tú førleikamennir teg?

# ÚTBÚGVING - LEIÐARAR




Spurningur: Í hvussu stóran mun, metir tú tað vera fíggjarligt rásarúm til, at førleikamenna starvsfólkini á stovninum?

# BØRN VIÐ SERLIGUM TØRVI - LEIÐARAR

Leiðararnir brúka í miðal 5,3 tímar um vikuna til arbeiði í samband við børnum við serligum tørvi.

Arbeiðið í samband við børnum við serligum tørvi er t.d. eygleiðingar, samrøður, skriv og fundir bæði innanhýsis og við uttanhýsis partar.




Spurningur: Í hvønn mun, metir tú, at tíðarnýtslan til arbeiði í samband við børn við serligum tørvi, er økt seinnu árini?

**Spurningur:**
***Kundi nakað verið gjørt fyri, at samstarvið við uttanhýsis partar um børn við serligum tørvi verður smidligari?***

1. økja tímatalið á dagstovnunum.
2. fleiri námsfrøðiligar ráðgevar og meiri serkøna starvsfólkaorku, bæði á dagstovnarnar og í kommunum.
3. meiri tíð frá Sernámi.
4. fleiri og meiri regluligar fastar sernámsfundir, og betri og títtari afturboðan.
5. fleiri samanhangandi tímar frá Sernám, í staðin fyri at koma á dagstovnin ein tíma "*her og har*".
6. Tíðin eigur at verða stytt, til barnið kemur til kanningar á Sernámi, at taka nýggj mál upp – børnini bíða ov leingi eftir at verða útgreinað.
7. hjálpin eigur at vera samanhangandi tvørtur um stovnar, ráð, land og kommunu og heim, dagstovn, frítíðarskúla og skúla.

# BØRN VIÐ SERLIGUM TØRVI - LEIÐARAR

# FYRIREIKING - LEIÐARAR

Fyrireiking hjá leiðarunum er allýst soleiðis:

*"Fyrireiking skal skiljast sum fyrireiking av námsfrøðiliga virkseminum á stovninum t.d. ársætlanir, virksemisætlanir, foreldraviðtalur, ráðleggingardagar, arbeiðsgongdir og mannagongdir og starvsfólkafundir."*

Leiðarar brúka 9 tímar um vikuna til at fyrireika námsfrøðiliga arbeiði.

# FYRIREIKING - LEIÐARAR




Spurningur: Í hvussu stóran mun er tíðin, tú sum leiðari hevur, at fyrireika námsfrøðiliga arbeiðið á stovninum hóskandi?

# EFTIRMETING - LEIÐARAR

**Eftirmeting hjá leiðarunum varð allýst soleiðis:**

*Ein tilgongd, ið krevur umhugsan, greining og týðilig metingarstøði, og verður gjørd fyri at fremja betringar.*

*Sostatt er eftirmeting her ikki ein leypandi meiri óskipað meting.*

*Eftirmeting fer fram av námsfrøðiliga virkseminum, tilgongdum og úrslitum at tryggja námsfrøðiligu góðskuna.*

*Eftirmeting kann gerast uttan og við eftirmetingarmaboðum t.d. við umhugsunar- og greiningaramboðum SMTTE og mátiamboðum sum t.d. TÍTT, SOS, SPU, TRAS og TRASMO og góðskumetingar av læruumhvørvinum á stovninum t.d. KIDS."*

Leiðarar brúka 4 tímar um vikuna til eftirmeting.

# EFTIRMETING - LEIÐARAR




Spurningur: Í hvussu stóran mun metir tú, tað vera tørvur á, at seta tíð av til at arbeiða meiri við, at menna førleikarnar at brúka eftirmetingartilgongdir og eftirmetingarambođ?

# EFTIRMETING - LEIÐARAR




Spurningur: Í hvussu stóran mun upplivir tú, at arbeiðið við eftirmeting á stovninum elvir til broytingar í námsfrøðiliga arbeiðinum?

Í kanning á dagstovnum í Danmark, meta umleið tríggir fjórðingar av dagstovnaleiðarunum, at teirra arbeiði við eftirmeting, hevur við sær broytingar í námsfrøðiliga arbeðinum.

# TÍÐARSKRÁSETINGAR HJÁ LEIÐARUNUM

**Uppgávubólkar til tíðarskrásetingarnar**

1. Umsiting
2. Starvsfólkaleiðsla
3. Foreldur
4. Barnatíð
5. Fundir
6. Praktiskt
7. Fyrireiking og eftirmeting
8. Støðgir

36 av leiðarunum hava skrásett fyrsta dagin, sum svarar til 75%.

35 leiðarar hava skrásett annan dagin, sum svarar til 73%.

34 leiðarar hava skrásett triðja dagin, sum svarar til 71%.

# TÍÐARNÝTSLAN HJÁ LEIÐARUNUM TIL UPPGÁVUBÓLKARNAR GJØGNUM DAGIN





# ÚRSLIT STARVSFÓLK

# TÍÐARSKRÁSETINGAR HJÁ STARVSFÓLKUNUM

**Uppgávubólkar til tíðarskrásetingarnar**

1. Foreldur
2. Praktiskt
3. Barnatíð
4. Innanhýsis fundir
5. Uttanhýsis fundir
6. Fyrireiking og eftirmeting
7. Steðgir

188 starvsfólk hava skrásett fyrsta dagin, sum svarar til 58%.

134 starvsfólk hava skrásett annan dagin, sum svarar til 45%.

127 starvsfólk hava skrásett triðja dagin, sum svarar til 39%.

122 starvsfólk hava skrásett allar dagarnar.

# Tíðarnýtslan hjá starvsfólkunum til uppgávubólkarnar gjøgnum dagin



# GONGDIN Í DONSKUM KANNINGUM FRÁ 1972 TIL 2007, OG SAMANBERING VIÐ FØROYSKU KANNINGINA

| | 1972 | 1981 | 1986 | 1990 | 1996 | 2000 | 2007 | 2022 Føroyska kanningin |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| % av arbeiðstíðini starvsfólkini bert eru saman við børnunum | 70% | 69% | 65% | 63% | 60% | 55% | 51% | 33% |
| % av arbeiðstíðini starvsfólkini eru saman við børnunum | 75% | 74% | 70% | 68% | 65% | 64% | 64% | 80% |

# PRAKTISKT – STARVSFÓLK

**Tíð nýtt hjá námsfrøðingum til at gera máltíðir:**

**43 minuttir um dagin**
**3 tímar og 40 min. um vikuna**

**Tíð nýtt hjá hjálparfólkum til at gera máltíðir:**

**52 minuttir um dagin.**
**4 tímar og 20 min. um vikuna**

# PRAKTISKT – STARVSFÓLK




Spurningur: Í hvussu stóran mun luttaka børnini, tá tit gera máltíðirnar á stovuni?

# PRAKTISKT – STARVSFÓLK

Umleið helvtin av starvsfólkunum brúka 1-4 tímar til reingerð um vikuna
43% brúka minni enn 1 tíma til reingerð um vikuna.

Námsfrøðingar brúka 1 tímar og 48 minuttir til reingerð um vikuna.

Hjálparfólk brúka 1½ tíma til reingerð um vikuna.

24% av námsfrøðingum og 31% av hjálparfólkunum gera høvuðsreint

Spurningur: Gert tú høvuðsreint á stovuni (størri reingerðararbeiði 1-2 ferðir um árið t.d. loft, gardinur og veggir)?

48% av námsfrøðingum og 38% av hjálparfólkunum gera umvælingararbeiði/húsavarðarbeiði

Spurningur: Hvussu nógvar tímar brúkar tú í miðal til umvælingararbeiði um mánaðin (handverkara/húsavarðaarbeiði, t.d. heingja hillar upp, skifta ljósperur, mála veggir og umvæla vognar)?

# PRAKTISKT – STARVSFÓLK

# PRAKTISKT – STARVSFÓLK

Donsk kanning vísir, at starvsfólkini á dagstovnunum brúka 2 tímar og 15 minuttir um vikuna til praktiskt arbeiði, sum fevna um allar praktiskar uppgávur.

Hava føroysku stovnarnir køkshjálp, brúka starvsfólk 5 tímar um vikuna til matgerð og reingerð, ið er meiri enn dupult so nógv tíð sum í Danmark.

Hava føroysku stovnarnir ikki køkshjálp brúka starvsfólkini 6 tímar og 20 minuttir um vikuna til matgerð og reingerð, ið er næstan 3 ferðir so nógv tíð sum í Danmark.

# ÚTBÚGVING – STARVSFÓLK




77%
taka ímillum
einki og 1 skeið

Spurningur: Hvussu nógv skeið, viðkomandi fyri námsfrøðiliga økið, tekur tú í miðal um árið?

# ÚTBÚGVING – STARVSFÓLK




Spurningur: Førleikamennir tú teg á annan hátt (til ber at seta fleiri frámerki)?

# BØRN VIÐ SERLIGUM TØRVI – STARVSFÓLK

85% av námsfrøðingunum arbeiða við børnum við serligum tørvi og brúka í miðal 3 tímar um vikuna.

36% av hjálparfólkunum arbeiða við børnum við serligum tørvi og brúka í miðal 6 tímar um vikuna.

Í danskari kanning frá brúka námsfrøðingarnir 2 tímar um vikuna til børn við serligum tørvi.

# BØRN VIÐ SERLIGUM TØRVI – STARVSFÓLK




Spurningur: Í hvønn mun metir tú, at tíðarnýtslan til arbeiði í sambandi við børn við serligum tørvi er økt seinnu árini?

# BØRN VIÐ SERLIGUM TØRVI – STARVSFÓLK

46% av námsfrøðingunum og 21% av hjálparfólkunum meta, at samstarvið við uttanhýsis partar um børn við serligum tørvi kundi verið smidligari.

Í danskari kanning svaraðu 36% av námsfrøðingunum á dagstovnunum, at samstarvið við uttanhýsis partar um børn við serligum tørvi kundi verið smidligari.

# FYRIREIKING - STARVSFÓLK

Fyrireiking hjá starvsfólkunum er allýst soleiðis:
*"Fyrireiking hjá starvsfólkum skal skiljast sum námsfrøðilig fyrireiking, t.d. tríggjar mánaða samrøður, námsfrøðilig ráðgeving, skriv og skjalfesting í sambandi við børn við serligum tørvi, Betri Vinir, Stig fyri Stig, Brúgvasamband, at fyrireika foreldrafundir, viðtalur, byrjanarsamrøður, stovufundir og lesa sær námsfrøðiliga vitan."*

# FYRIREIKING - STARVSFÓLK

54% av námsfrøðingunum hava fasta fyrireikingartíð.

23% av hjálparfólkunum hava fasta fyrireikingartíð.

Námsfrøðingar hava 1 tíma um vikuna til fasta fyrireikingartíð.

Hjálparfólk hava 0,4 tímar um vikuna til fasta fyrireikingartíð.

Námsfrøðingar brúka 2 tímar um vikuna til fyrireikingartíð so hvørt.

Hjálparfólk brúka 1,4 tíma um vikuna til fyrireikingartíð so hvørt.

# FYRIREIKING - STARVSFÓLK




Spurningur: Hvussu nógvar tímar í miðal um vikuna eru settir fast av til, at tú fyririreikar námsfrøðiligar arbeiðið?

# FYRIREIKING - STARVSFÓLK

**Føst fyrireikingartíð býtt á vøggustovur, barnagarðar og frítíðarskúlar**




| | Vøggustova | Barnagarður | Frítíðarskúli |
|---|---|---|---|
| Miðal tímatal um vikuna | 1,6 | 1,5 | 2,9 |

# FYRIREIKING – STARVSFÓLK




| | Ongantíð/sjáldan | Av og á | Ofta/sera ofta |
|---|---|---|---|
| Námsfrøðingar | 21% | 35% | 44% |
| Hjálparfólk | 19% | 47% | 35% |

■ Námsfrøðingar ■ Hjálparfólk

Spurningur: Kemur tað fyri, at tú ikki fyrireikar teg, tí tað eru ov fá starvsfólk á stovuni?

# FYRIREIKING – STARVSFÓLK




Spurningur: Í hvussu stóran mun metir tú teg hava neyðugu tíðina til fyrireiking?

# FYRIREIKING – STARVSFÓLK




Spurningur: Hvar fyrireikar tú teg (til ber at seta fleiri frámerki)?

# EFTIRMETING - STARVSFÓLK

Í spurnablaðnum var eftirmeting hjá starvsfólkunum allýst soleiðis:

*"Eftirmeting hjá starvsfólkum skal skiljast sum ein skipað tilgongd, ið krevur umhugsan, greining og týðilig metingarstøði og verður gjørd fyri at fremja betringar. Tað vil siga, at eftirmeting her ikki skal skiljast sum meiri óskipaðar metingar, tankar og samrøður. Eftirmeting av námsfrøðiliga virkseminum kann gerast við t.d. at eftirmeta tilgongdir og úrslit, við at eygleiða barnið, at skjalfesta í sambandi við Sernám, Barnaverndartænastuna og Børn&Ung (Tórshavn) og við t.d. umhugsanar- og greiningaramboðnum SMTTE og máliamboðum sum t.d. SPU, SOS, TÍTT, TRAS og TRASMO."*

# EFTIRMETING - STARVSFÓLK




Spurningur: Hvussu eftirmetir tú? (til ber at seta fleiri frámerki)

# EFTIRMETING - STARVSFÓLK

Námsfrøðingar brúka 1 tíma um vikuna til eftirmeting.
Hjálparfólkini brúka 0,6 tímar um vikuna til eftirmeting.

Námsfrøðingar brúka 1,9 og hjálparfólk brúka í miðal 1,8 eftirmetingaramboð.

Í Danmark brúka dagstovnarnir 6 eftirmetingaramboð.

# Eftirmeting - starvsfólk




Spurningar: Hvørji eftirmetingaramboð brúkar tú (til ber at seta fleiri frámerki)?

# EFTIRMETING - STARVSFÓLK




Spurningur: Í hvussu stóran mun metir tú teg hava neyðugu tíðina til at eftirmeta?

# EFTIRMETING - STARVSFÓLK




Spurningur: Í hvussu stóran mun upplivir tú, at títt arbeiði við eftirmeting elvir til broytingar í námsfrøðiliga arbeiðinum?

# FYRIREIKING OG EFTIRMETING- STARVSFÓLK

Tess hægri starvsbrøk, tess meiri tíð varð nýtt til fyrireiking so hvørt.

Tess fleiri skeið, tess meiri tíð varð nýtt til fyrireiking so hvørt.

Hava starvsfólk fasta fyrireikingartíð, eru sannlíkindini hægri at tey eisini eftirmeta (3 ferðir).

# FYRIREIKING OG EFTIRMETING - STARVSFÓLK

Námsfrøðingar hava í nógv størri mun fasta fyrireikingartíð í mun til hjálparfólk (4 ferðir).

Er køkshjálp, er størri sannlíkindini fyri fastari fyrireikingartíð hjá starvsfólkunum (meiri enn 2 ferðir).

Tess meiri starvsfólk førleikamenna seg, tess fleiri hava fasta fyrireikingartíð.

# BØRN VIÐ SERLIGUM TØRVI - STARVSFÓLK

Tess fleiri máltíðir starvsfólkini gera, jú minni tíð brúka starvsfólk til børn við serligum tørvi.

Størri stovurnar eru, meiri tíð brúka starvsfólk sannlíkt uppá børn við serligum tørvi.

Ein ábending er um, at jú fleiri skeið starvsfólk taka, jú meiri tíð verður nýtt til børn við serligum tørvi.



Takk fyri